# Sóljudansir í Sortudíki



*Unn Patursson setti dám á dagin, tá sóljudansirnir hjá Alexandur Kristiansen vórðu framførdir Norðurlandahúsinum sunnudagin*

*Mynd: Ingi Rasmussen*

**Um vikuskiftið kom fløga út við barnasangum eftir Alexandur Kristiansen. Hetta varð heiðrað saman við føðingardagsbarninum í Sortudíki um vikuskiftið**

BARNAFLØGA
*Ingi Rasmussen*

Har Norðurlandahúsið í dag stendur við Sortudíki, varð áður bøur og mýrilendi við sóljum.

Sunnudagurin stóð eisini í tekni sóljurnar í Norðurlandahúsinum. Um kvøldið fylti Guðrun Sólja Jacobsen stóra salin heilar tvær ferðir. Um dagin var eisini sóljudansur, men tað hevði onki við ta nú víðagitnu stjørnuna at gera.

Í sambandi við at fløgan »Sóljudansir« við løgum og yrkingum eftir Alexandur Kristiansen kom út hendan dagin, vóru løg av fløguni framførd í Klingruni.

Spælimenninir við Kristian Blak á odda spældu undir, og barnafamiljur høvdu leitað sær niðan í góðveðrinum. Sangararnir Kinna Poulsen, Unn Patursson, Kári Sverrisson og Herluf Lutzen gjørdu sítt til, at sangirnir hjá Alexandur Kristiansen komu til heiður og æru. Á gólvinum stóðu sóljutyssi í gløsum, Norðurlandahúsið bjóðaði bomm, og børnini hugnaðu sær ófórt.

Fuglfirðingurin Alexandur hevur gjørt nógvar yrkingar fyri børn millum ár og dag, men hetta er so fyrstu ferð, at hann eisini hevur sett løg til og givið tað út á fløgu. Yrkingarnar eru ofta smásøgur ella orðaspøl við einum stuttligum enda.

Norðurlandahúsið hevur verið ein treytaleyst succes, og húsið er fyri øll, var ein partur av boðskapinum, nú Húsið í stórum stíli helt 20 ára føðingardag um vikuskiftið. Sunnudagin sást, at eisini børnini sleppa upp í part, og gott hevði verið, um hendan successin var endurtikin av og á. Tí tað var týðiligt, at eisini tey smæstu stórtrívast á gólvinum, har gular sóljur áður vóru.

Feðgarnir báðir
Stabbi og Tongul
Fóru til Áir
At Keypa ein ongul
Men krambagentan
var starblind og deyv,
tí teir komu aftur
ongul í reyv

**Alexandur Kristiansen**

# Stjørnudust



*Guðrun Sólja Jacobsen og Jacob Andersen syngja bæði frálíka væl. Tey vóru stjørnur meira enn nakrantíð sunnukvøldið*

**Tað hava neyvan verið størri stjørnur í Norðurlandahúsinum enn tey í Stjerne for en aften. Sjálv konsertin kundi tó verið betri**

UMMÆLI
*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Salurin í Norðurlandahúsinum var karmur um stjørnukonsert tvær ferðir sunnukvøldið. Tiltakið var slúsað upp í tjúgu ára haldið hjá mentanarborgini, og tað mundi eisini vera tað best umtókta.

Til hesa fyrstu konsertina var suðuroyardialektin týðulig. Væl omanfyri helvtin av áhoyrarunum vóru suðuroyingar, og hetta var eisini nakað tey úr Suðuroy og restin av salinum hevði glett seg til.

Og hóast nógvir góðir og kendir tónleikarar hava staðið á palli í salinum í Norðurlandahúsinum, so hevur húsið valla hýst størri stjørnum. Ì Føroyum er einki sum Stjerne for en aften og Guðrun Sólja Jacobsen.

Og hetta kvøldið vóru tey kanska meira enn nakrantíð stjørnur.

Konsertin byrjaði við einari føroyskari stjørnum av Tvøroyri, Brandi Enni. Hann hevur verið ein sindur á palli í seinastuni við ymisk høvi.

Hann nýtti tvær ymsar uppstillingar. Eina við tveimum dansarum og eina við tónleikarum á pallinum. Hann virkaði ógvuliga væl upplagdur á pallinum. Hansara framførsla og útstráling eru frálík. Ein væl vand framførsla, sum ikki minti heilt lítið um tær, ein sær frá ungdómsstjørnum úti í heimi.

Men at sita í Norðurlandahúsinum og lurta eftir einari fløgu, meðan nøkur fólk toyggja seg á pallinum, er ikki 195 kr. vert á nakran hátt. Tónleikurin sum var live var sjálvandi munandi betri, men kortini ikki nakað upplivilsi, sum hevur uppiborðið tað heilt stóra lýsningarorðið.

So var ein hálvur tími farin og umvegis eitt frásøgufólk kom fyrst Martin Pedersen á pallin, eftir at tær báðar kórgenturnar, Christina Elisabeth og Noomi, høvdu sungið eyðkennislagið til Stjerne for en aften, har bert tann eina mikrofonin var tendrað. Hann endaði ikki millum tríggjar teir bestu í Stjerne for en aften, men hann hevur gjørt vart við seg, og føroyingar tóku hann eisini til sín.

Hann vísti seg at riggað ógvuliga væl á pallinum. Hann úrstrálaði sjálvsálit sum fáur, og bilar ikki beinleiðis við at syngja heldur. Hann sang U2, Elvis, Mike and The Mechanics og sjálvandi eisini “Feel” hjá Robbie Williams.

Og sangirnar hevði mann hoyrt fyrr, og tað var stuttligt at síggja tað, sum fyrr hevði verið í sjónvarpinum á pallinum, men heldur ikki nógv meira var tað ikki.

Jacob Andersen hevur eina ótrúliga rødd við mátti og megi. Maðurin hevur spælt fleiri ferðir áður í Føroyum, men tað munnu vera fá, sum minnast hann, men hesa ferð fer tað nokk ikki at knípa so nógv við minninum. Hann sang framúrskarandi væl, og hann útfoldaði seg rættiliga. Men sum við nógvum øðrum hetta kvøldið var heildin eitt sindur skøvað. Tað at síggja “Are you gonna go my way” hjá Lenny Krawitz í Norðurlandahúsið var eitt upplivilsi í sær sjálvum, men hann hevði hug at druknað í samlaðu ljóðmyndina.

Sum heild var tað øgiliga hart, og tað vóru fleiri løg, sum duttu heilt burturímillum. Eitt nú duétin við Guðrun Sólju Jacobsen og Jacob Andersen við sanginum, sum Jacob sjálvur hevur gjørt, virkaði illa samansett í ljóðmeldrinum sunnukvøldið.

Men Jacob Andersen góður, so er Guðrun Sólja líka góð ella betri. Hennara talent kann tað ikki setast spurnartekin við, og hon vísti sunnukvøldið fleiri spennandi síður av sær sjálvari. Stóra upplivilsið var, tá hon sang Weak hjá Skunt Anansie. Hesin skuldi av einari ella aðrari orsøk vera ein duét við Martin Pedersen, uttan at hetta gav stórvegis meining.

Annars sang hon bæði Hero og Promise Me, og við heimadómarabrillunum fast á nøsini, so var hon bjartasta stjørnan sunnukvøldið.

Tað er uttan iva lítið høpi í at skriva ummæli um nakað, sum er ein treytaleys succes. Sunnukvøldið lýstu stjørnurnar, og tað skal eingin ivi vera um, at tey eru stjørnur. Størsta tónleikaliga hendingin – í øllum førum í rútmiskum tónleiki – í Føroyum eru nakað, føroyingar týðuliga eru ernir av. Og tað er væl skiljandi, og vónandi heldur stjørnusúsið eisini fram kvøld eftir kvøld.

Men skal rætt vera rætt, so var hetta langt frá onkrari av teimum heilt góðu konsertunum í Norðurlandahúsinum. Konsertin kundi verið munandi meira raffinerað og nógv minni rótut. Eitt gott publikum upplivilsi, men ikki eitt heildarupplivilsi í stjørnuhæddum.



*Martin Pedersen lýsti næstan av sjálvsálitinum, sum gera hann til ein rættan entertainer*



# Føroyingar eru villir

**Martin Pedersen og Jacob Andersen vóru heilt ovfarnir av føroysku áhoyrafjøldunum, sum teir spældu fyri um vikuskiftið**



*Jacob Andersen og Martin Pedersen søgdu seg vera púra bergtiknar av føroysku áhoyrarfjøldini. Og fyrt tað kundu teir gott geva ein muss*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

PRÀT
*Heri á Rógvi*

Tey vóru fyri hvønn annan. Tað vil siga áhoyrararnir vóru glaðir fyri Jacob Andersen og Martin Pedersen, og hinvegin vóru Martin og Jacob eisini ógvuliga glaðir fyri føroysku áhoyrarafjøldina.

– Føroyingar eru villir. Tað er feitt, sigur Jacob Andersen, og Martin Pedersen er samdur við honum.

– Tú merkir væl, at tey "lada" upp til hesar konsertinar. Tey geva veruliga okkum nakað aftur, sigur Martin Pedersen.

Hetta er fyrstu ferð, at Martin er í Føroyum, men Jacob hevur spælt í Føroyum áður. Fyri tveimum árum síðani var hann í Føroyum við bólkinum Yotak. Bólkurin spældi m.a. í Kagganum og í Platform. Tað eru kanska ikki so nógv, sum minnast Jacob frá tí túrinum, men hann minnist væl túrin.

– Umborð á Norrønu á veg til Føroya skrivaði eg ein sang, sum eg og Guðrun sungu sum duét í kvøld (sunnukvøldið, blðm.). Eg helt tað vera so upplagt, og eg vóni eisini, at Guðrun syngur hann saman við mær á míni komandi útgávu.

**Rætti vinnarin**

Vóru teir báðir bergtiknir av føroysku áhoyrarfjøldini, so eru teir eisini bergtiknir fyri Guðruni Sólju Jacobsen.

– Skalt tú vera ein góður vinnari, so mást tú eisini vera ein góður tapari, og eg haldi tað vera fult uppiborið, at Guðrun vann, sigur Martin Pedersen.

– Og eitt ella annað stað vistu vit eisini, at hon fór at vinna, sigur Jacbo Andersen.

Teir siga seg báðir nýta nógv at ferðast runt og spæla í Stjerne for en aften høpi. Til oktober mánað eru teir knýttir at hesum, og eftir tað, mugu teir klára seg sjálvar.

Og teir ásanna, at tað er neyðugt at halda seg framat.

– Í hesari vinnuni kanst tú skjótt verða gloymdur. Tí er neyðugt at tú heldur teg ígongd og gert nakað við tað, og tað er tað, vit royna at gera, sigur Martin Pedersen.

Men støðan sum stjørna er ikki alt.

– Eg havi spælt í 15 ár uttan at gerast kendur, og eg skal nokk spæla 15 ár afturat, um so eg verði verandi kendur ella ei, sigur Jacob Andersen.

**Plátusáttmáli**

Viðvíkjandi útgávum er støðan hjá teimum báðum eitt sindur ymisk. Jacob Andersen hevur fingið ein plátusáttmála við Universal, sum Guðurn S. Jacobsen eisini hevur sáttmála við. Hann fer at gera eina fløgu í næstum við mest egnum sangum.

Martin Pedersen vil eisini fegin gera eina fløgu, men hann hevur ikki enn fingið nakran plátusáttmála.

Men báðir ætla at halda fram við tónleikinum. Tað er vist, siga teir.

# Fyrsta útgávan í juli

**Managerin hjá Guðruni Sólju Jacobsen heldur, at hon hevur tey sermerki, sum bert veruligar stjørnur hava, og møguleikarnir eru nógvir, heldur hann. Fyrsta stakfløgan kemur á marknaðin í juli**



*John Christoffer, manager, trýr upp á evnini hjá Guðruni Sòlju*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

PRÀT
*Heri á Rógvi*

John Christoffer er manager hjá Guðruni Sólju Jacobsen og hinum í Stjerne for en aften. Hann er ein royndur harri, sum millum annað er manager hjá Stig Rossen.

– Eg varð biðin av Danmarks Radio um at vera manager hjá teimum fyri at hjálpa teimum ígongd. Hetta skal eg fyribils gera í eitt hálvt ár, sigur John.

Tað merkir eisini, at hann hevur nógv at gera við komandi útgávuna hjá Guðruni Sòlju Jacobsen.

Hann dugir tó ikki at siga, júst nær fløgan kemur út, men miðjað verður ímóti, at fyrsta stakfløgan kemur út í juli. Hetta er eftir ynskir frá plátufelagnum.

– Vit vita ikki enn, hvør sangurin á stakfløguni verður, men vit hava spildurnýggjan sang í huganum, sum er frálíka góður, lovar John.

**Talent**

Sum manager er tað kanska ikki so undarligt, at John Christoffer heldur nógv um Guðruna, men hann metir veruliga, at hon hevur nakað serligt.

– Guðrun hevur talent. Eins og við teimum stóru stjørnunum, so hoyrir tú, at hon er nakað serstakt. Møguleikarnir eru nógvir við tílíkum talenti, sigur John.

# Heilt fantastiskar

**Føroysku kórgenturnar vórðu róstar upp um skýggja av sangarunum í Stjerne for en aften**

KONSERT
*Heri á Rógvi*

Orkestrið, sum spældi til Stjerne for en aften konsertirnar um vikuskiftið, hevði valt tveir føroyskar kórsangarar.

Talan var um tríggjar framførslur – eina í Mentunarhúsinum í Fuglafirði og tvær í Norðurlandahúsinum.

Og tær báðar kórgenturnar Christina Elisabeth og Noomi vóru róstar upp um skýggja av luttakarunum. Bæði Martin Pedersen og Jacob Andersen hildu fyri, at tær báðar vóru heilt einfalt fantastiskar.

Kapelmeistarin Gorm Bullow, sum millum annað hevur verið kapelmeistari við danska Melodi Grand Prixið, segði seg vera heilt ovfarnan av støðinum í Føroyum og hjá teimum báðum kórsangarunum.





*Christina Elisbeth Mørkøre v.m. og Noomi Háberg Hansen sungu kór fyri stjørnurnar sunnukvøldið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*